# Lilla smæra

Merkið skal takast saman við  patruljuni, liðnum ella á legu, saman við øðrum skótum.

Skótar, ið hava tikið reyðu smæru kunnu fara undir lilla smæru.



## LILLA SMÆRA

Merkið skal takast í skótahøpi. Tað kann vera við patruljuni, liðnum ella á eini legu.

### LEGULÍV

**Kravdar uppgávur:**

- [ ] Vera við á einari vikulangari skótalegu
- [ ] Duga pionerarbeiði, har tit m.a. Brúka japanska krosssurring, filipinarasurring og eingilska paralellsurring.
- [ ] Leggja skrá fyri og leiða eitt legubál/eina kvøldsetu.
- [ ] Fremja eina 24 tíma langa heik.
- [ ] Ger eina matarskrá og keyp inn til eina legu.
- [ ] Duga at kynda bál við bert einum svávulpinni. Vita hvat slag av brenni og tendritilfari kann nýtast fyri at hettar riggar. Ikki nýta tendriveskur ella annað ið kann vera vandamikið.

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fimm:**

- [ ] Gera eitt sólur, stilla tað ein bjartan sólskinsdag og klára tykkum í eitt samdøgur við tí sum einastu klokku at ganga eftir.
- [ ] Gera eina brúsu á eini legu
- [ ] Gera eitt legukøliskáp
- [ ] Gera einar portursdyr við portri á, sum kann latast upp og aftur.
- [ ] Gera faklar og brúka teir til okkurt serligt høvi

- [ ] Gera ein skammil við "kulsøpionering"
- [ ] Knýta ein heingikoyggju
- [ ] Gera ein brúkslut av leiri og brenna hann í einum ovni, tit sjálvi gera.
- [ ] Gera eina brúgv yvir um eina á.
- [ ] Leggja ætlan fyri einari súkkluheik á 100 km. og royna hana.
- [ ] Planleggja og Skipa fyri einari legu saman við einum øðrum skótaliði.

## SAMSKIPANIN OG ALTJÓÐA SKÓTAARBEIÐI

**Kravdar uppgávur:**

- [ ] Fáa greiði á, hvussu felagskapur KFUK-skótana er uppbygdur
- [ ] Gera seg kunnigan við endamál og skipan hjá the World Association of Girl Guides and Girl Scouts (WAGGGS)
- [ ] Gera eina kapping til liðið um altjóða skótaarbeiði
- [ ] Kanna hvussu skótaarbeiði er í einum landi frá hvørjum av teim 5 heimspørtunum.
- [ ] Bjóða einari patrulju frá einum øðrum liði til eitt tiltak, tit skipa fyri

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fimm:**

- [ ] Gera kunningartilfar um KFUK-skótarnar. Veljið ein málbólk, eitt nú foreldur, børn (komandi skótar), ella skótar úr einum øðrum landi.
- [ ] Læra nakrar dansir úr einum øðrum landi og læra hinar í liðnum teir.
- [ ] Bjóða einum skóta, sum hevur vitjað eitt heimsskótacentur, ella luttikið á altjóða skótalegu so sum Jamboree ella Moot at koma at greiða frá upplivingini.
- [ ] Bjóða útlendskum skótum við á eina legu.
- [ ] Ger ein film um liðið hjá tykkum í samband við eitt altjóða skótatiltak.
- [ ] Finna tilfar um Olave Baden-Powell ella Agnas Baden-Powell og gera eina framløgu ella filmsbrot.
- [ ] Kanna hvørjar treytir skulu lúkast fyri at skótaarbeiðið hjá einum landi kann vera altjóða viðurkent.

## SAMFELAGIÐ OG SKÓTAVIRKSEMI

**Kravdar uppgávur:**

- [ ] Fáa kunnleika til hæddarkurvar og signatur á korti.
- [ ] Læra at gera røringar og spleysingar.
- [ ] Kenna og venja deyva-stavrøðina
- [ ] Duga lívbjargandi fyrstuhjálp.

- ▢ Læra at brúka hjartastartara.
- ▢ Duga at geva boð við semafor.

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fimm:**

- ▢ Læra morsialfabetið uttanat. Eitt nú við at visualisera morsitalvuna.
- ▢ Venja at bákna, so tit kunnu senda og taka ímóti eini morsifrágreiðing á 75 bókstavir í 5-9 min. Uml. 150 m. fjarstøða.
- ▢ Gera eina stóra silvakumpass úr papp ella øðrum og læra yngri skótar ella onnur á liðnum at brúka kumpass.
- ▢ Luttaka á fyrstuhjálpskeiði hjá Reyða krossi (12 tímar)
- ▢ Spyr eitt tingfólk um tit kunnu vitja í Tingsalinum. Kenna til fólkaræði og tingskipan. Vita hvørjir flokkar eru umboðaðir í Løgtinginum og hvørji eru landstýrisfólk. Møguliga luttaka á Tingfundi.
- ▢ Duga at brúka eldsløkkjara, brandteppi og aðra sløkkiútgerð.Vita hvør útgerð skal brúkast nær. Kenna til trygdarreglur við brúk av báli og duga at køva eld í eitt nú grýtu
- ▢ Duga at viðgera brandsár
- ▢ Læra lívbjarging á sjónum.
- ▢ Megna at svimja 300 m.

## KRISTNIKUNNLEIKI OG HJÁLPARARBEIÐI

**Kravdar uppgávur:**

- ▢ Vita hví vit hava altargang. Vera í kirkju tá altargangur er.
- ▢ Veljið ein persón úr Bíbliuni. Kanna hvør persónurin var. Ger eina teknirøð, sjónleik ella film um lívið hjá hesum persóni.
- ▢ Gerið eitt yvirlit yvir hvørjir hjálparfelagskapir virka í Føroyum. Hvør er teirra málbólkur og hvussu hjálpa tey. Vel ein hjálparfelagskap, ið tit ynskja at fáa meira at vita um og fáið onkran har frá at koma at greiða frá teirra arbeiði.
- ▢ Kanna hvat ein primstavur er, og gera ein primstav til patruljuna.
- ▢ Skriva eina kvøldbøn, sum tit so nýta til eitt legubál áðrenn songartíð.

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fimm:**

- ▢ Lesa um minst tríggjar av Jesu undirgerðum. Veljið ein av teimum og framførið hann á eini legu, undir eini guðstænastu, foreldratiltaki ella aðrastaðni.
- ▢ Brúka Nýggja testamenti fyri at finna út av, hvussu Jesu lærusveinar itu, og

hvussu tað gekk fyri seg at hvør av teimum gjørdist lærusveinur.
- [ ] Lesa trúuarjáttanina í sálmabókini og finna út av í hvørjum føri í guðstænastuni hon verður brúkt.
- [ ] Skipið fyri einum tíðindafundi, har ein í patruljuni spælir ein av evangelistunum og hini eru tíðindafólk, ið seta spurningar til evangelistin. Skiftið ímillum hvør skal vera evangelistur. Fyrireikið tykkum, so tit hava grundleggjandi vitan um evangelistarnar áðrenn tíðindafundin.
- [ ] Vel eitt føroyskt sálmaskald, finnið tilfar um sálmaskaldið. Læra 3 sálmar uttanat.
- [ ] Ger eitt filmskvøld og hyggið eftir fyrsta filminum í Narnia røðini " Heksin, leyvan og garderobuskápið". Rithøvundurin til bókina hevur nógvar tilvísingar til bíbliuna í søguni. Hvørjir persónar ella hendingar úr bíbliuni eru at finna í Narnia filminum? Ger eitt yvirlit sjálvar.

## NÁTTÚRAN OG UMHVØRVIÐ

**Kravdar uppgávur:**

- [ ] Kenna sporini hjá vanligum djórum í Føroyum. Í minsta lagi seyður, ross, hundur, ketta, hara, antarfuglur og smáfuglur.
- [ ] Duga at kunna tykkum um veður og streymviðurskifti.
- [ ] Kenna minst 5 stjørnumyndir og duga at vísa á tær. Duga at finna hvar norður er, við at hyggja at stjørnuhimmalinum.
- [ ] Fara á seiðaberg, ella til útróður. Kryvja fiskin, greipa og heingja hann upp at ræsa, ella gera eina máltíð burturúr feska fiskinum.
- [ ] Far ein túr í hagan. Ganga eftir varðum frá einari bygd í aðra.
- [ ] Lærið tykkum hvørjar fríttvaksandi urtir, plantur, ber og soppar í Føroyum kunnu etast. Ger eina máltíð við minst einum av hesum ráðvørunum.

**Valfríar uppgávur. Veljið minst fimm:**

- [ ] Seta seg inn í tær gomlu veðurmetingarnar og royna at spáa veðrið á hvørjum skótafundi í ein mánaða.
- [ ] Gera eitt savn við minst tjúgu plantum, sum vaksa í Føroyum. Skriva føroyska og latínska navnið. Ansið eftir ikki at heinta hóttar plantur.
- [ ] Lærið tykkum at fletta seyð og at gagnnýta tilfeingið av seyðinum.
- [ ] Takið fuglaljóð upp í haganum. Kanna aftaná hvørji fuglaljóð tit hava hoyrt.
- [ ] Lita tógv við plantum.
- [ ] Gera eina standmynd av kava- minst 2 m høg.
- [ ] Læra at seta segl á báti.
- [ ] Duga nøvnini á fjøllunum á tínari Oyggj. Fara upp á minst tríggjar fjallatindar

sama dag.

- [ ] Í eitt samdøgur skulu tit einans eta føroyskar ráðvørum og minst 3 ráðvørur skulu tit sjálvi hava fingið til vega. Hettar kann eitt nú vera epli tit hava tikið upp, mjólk tit sjálvi hava mjólkað, fisk tit hava fanga, skeljadjór o.s.fr. Restina av ráðvørunum kunnu tit keypa.
- [ ] Plantið grønmeti og urtir til tykkara patrulju.
- [ ] Vitjið eina brennistøð ella ruskinnsavningarstað og setið tykkum inn í hvønn mun rusk verður endurvunnið og á hvønn hátt.

Tillukku!

Tú hevur nú staðið lilla smæru. Merkið kann seymat á ermuna.